Sosialurin




SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-CIA, amerikanska fregnartænastan, er ikki annað enn ein heimsumfatandi drápsmaskina (Fidel Castro).*

# -Vit lata okkum ikki ræða

**-Vit fara ongantíð at slaka fyri yvirgangsmonnum, og bretar lata seg ikki ræða av slíkum, sigur Gordon Brown**




*Gordon Brown: -Bretar lata seg ikki ræða*

Bretar stúra fyri yvirgangsatsóknum hvørja løtu, og myndugleikarnir hava sett øll tilbúgvingartiltøk í verk. BBC visti at siga í morgun, at løgreglan leitar eftir einum ella fleiri monnum, sum verða settir í samband við teir, sum høvdu lagt bumbur í tveir bilar í London fríggjadagin, og sum søktu at floghavnini í Glasgow leygardagin.

Higartil hevur løgreglan handtikið fimm fólk. Løgreglan sigur, at øll eru upprunaliga úr Miðeystri, og at ein kvinna er millum tey tiknu. Júst teirra uppruni hevur fingið øði í nógvar bretar, og myndugleikarnir hava inniliga heilt á fólk um ikki at gera seg inn á muslimar.

Peter Clarke, sum stendur á odda fyri teirri serligu bretsku yvirgangsløgregluni, sigur við BBC, at tað er at kalla eingin ivi um, at samband er millum bumburnar í London og atsóknina í Glasgow. Hann sigur seg hava góðar vónir um, at løgreglan fer at loysa málið, sum hann málber seg.

### Harðlig byrjan

Gordon Brown hevði ikki meiri enn sett seg í forsætisráðharrastólin í Downing Street, tá løgreglan kunngjørdi, at hon hevði funnið eina bumbu í einum bili í London. Stutt eftir bleiv enn ein bumba funnin í høvuðsstaðnum, og leygardagin rendu yvirgangsmenn ein brennandi bil inn í høvuðsdyrnar á flogvøllinum í Glasgow.

-Vit vita, at yvirgangsmenninir hava tilknýti til al-Qaeda. Men teir skulu vita, at vit slaka ikki, og at vit lata okkum ikki ræða, segði Gordon Brown í samrøðu við BBC í gjár.

Bretsku fjølmiðlarnir eru á einum máli um, at Gordon Brown kláraði ta óvæntaðu avbjóðingina væl, men teir eru eisini samdir um, at tað var munur á at hoyra hann og at hoyra Tony Blair, tá London varð álopin fyri tveimum árum síðani.

-Hann er ikki so smidligur sum Blair, men tað er myndugleiki aftan fyri orð hansara, skrivar BBC á heimasíðuni.

# Víkingar aftur á ferð

**Danir eru farnir í víking. Víkingaskipið "Havhingsten" er á veg til Írlands.**

"Havhingsten", sum er eitt sokallað langskip, er smíðað eftir tí kenda víkingaskipinum, sum kom undan kavi í Roskildefjørðinum í 1962, har tað sambært fornfrøðingum hevði ligið í eini 950 ár.

Í gjár setti "Havhingsten" segl, og við 65 fólkum innanborða setti skipið kós ímóti Dublin í Írlandi. Skipari er Carsten Hvid, og hann hevur sagt, at ferðin til írska høvuðsstaðin fer ætlandi at taka hálvanannan mánað. Teinurin úr Roskilde til Dublin er góðar 1.000 fjórðingar.

Nógv fólk vóru komin saman at siga víkingaskipinum farvæl, og teirra millum var írski umhvørvismálaráðharrin, Dick Roche.

-Hesafrerð eru tit vælkomin til Írlands, segði hann brosandi, tá hann beyð manninginiá "Havhingsten" færvæl og ynskti teimum góðan byr.



*»Havhingsten« er 30 metrar langt víkingaskip, og tað hevur tikið sjey ár at smíða skipið*

## STUTT SAGT

### Kravdu demokrati

Í hesum døgum eru tíggju ár, síðani bretar lótu Kina ræðið í Hongkong, og í gjár gingu fólk í tíggjutúsundatali gingu kravgongu í býnum, har tey kravdu meiri demokrati. Tíggju ára galdi líktist annars mest einum grýludegi, men kravgongan vísti, at tað var ikki bara gleði aftan fyri gekkaskortarnar. Fólk savnaðust uttan fyri skrivstovurnar hjá myndugleikunum undir herrópinum: Ein maður, ein atkvøða. Tey, sum skipaðu fyri kravgonguni, søgdu, at umleið 70.000 fólk vóru í gonguni, men løgreglan sigur, at tey vóru 20.000 í tali.

### Galapagos fer illa

ST-nevndin, sum heldur eyga við støðum, ið eru skrásett sum Heimsins Arvur, sigur nú, at tað sermerkta náttúruumhvørvið á Galapagosoyggjunum í Kyrrahavinum tolir ikki tey nógvu ferðafólkini, sum vitja oyggjarnar. Á hvørjum ári vitja umleið 120.000 ferðafólk oyggjarnar, og ótilvitað hava tey plantur og djór innan av meginlandinum við sær. ST sigur, at nú eru fleiri innflutt plantu- og djórasløg í oyggjunum enn tey upprunaligu, og at 180 av teimum upprunaligu plantusløgunum eru í vanda.

### Nøgdir íslendingar

Ein meiningakanning vísir, at veljararnir hjá teimum báðum samgonguflokkunum eru yvirhøvur nøgdir við tey, sum mann ta nýggju stjórnina hjá Geir H. Haarde, forsætisráðharra. 80 prosent av veljarunum hjá Samfylgingini eru nøgdir, og 71 prosent av veljarunum hjá Sjálfstæðisflokkinum siga tað sama.